## Hósdagur 15. november

**SVF**

18.25 DV í kvøld
18.30 Smásøgur
18.35 Jumanji 30
19.00 Sangir frá Fjallafonn (e)
20.00 Dagur og Vika við orðaskifti upp undir fólkatingsvalið
20.45 Horvin 7:8 – donsk dokumentarrøð
21.15 Ally McBeal 12 – amerikonsk røð
22.00 Roomservice – íbúðin verður broytt – seinasta send.
22.25 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 1:2
23.15 Liðugt

**EUROSPORT.com**

07:30 Football
08:30 Football
09:30 Football
10:00 Football
10:30 Football
11:00 Snowboard
11:30 Football
12:00 Football
13:00 Football
14:00 Football
15:00 Football
16:00 Football
16:30 Football
17:00 News
17:15 Football
18:00 Football
19:00 Sumo
20:00 Football
22:00 News
22:15 Football
23:15 Football
00:15 News
00:30 Close

**BBC PRIME**

0.05 TLZ: »Prohibition – 13 Years that Changed – The Roaring Twenties«
1.00 TLZ: »Century of Flight – Wings Over the Sea«
2.00 TLZ: »Philosophy In Action: Debates About Boxing«
2.30 TLZ: »Theory And Practice«
2.55 TLZ: »Cyberart«
3.00 TLZ: »The Celebrated Cyfarthfa Band«
3.25 TLZ: »Music E.Motions - Together«
3.30 TLZ: »Open Advice – Exam Success«
4.00 TLZ: »Troubleshooter – Getting Your Ducks In Line«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tudors and Stewarts – Charles II«
5.00 TLZ: »Greek Language & People – Buying Things«
5.30 Muzzy In Gondoland
6.00 Bodger And Badger
6.15 Playdays: »The Whybird Stop«
6.35 Steps To the Stars
7.00 Ready Steady Cook
7.30 Garden Magic: »Bromsgrove«
8.00 House Invaders: »Plaistow«
8.30 Going for a Song
9.00 Battersea Dogs Home
9.30 Vets in Practice: »Trouble Ahead«
10.00 Radical Highs
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Attack of the Cybermen«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »A Rose By Any Other Name
13.30 Radical Highs
13.45 Ready Steady Cook
14.15 Bodger And Badger
14.30 Playdays: »The Whybird Stop«
14.50 Steps To the Stars
15.15 TOTP Eurochart
15.45 Ainsley's Gourmet Express: »The Beach«
16.15 Ground Force: »Northampton«
16.45 Miss Marple: »Murder At the Vicarage«
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Murder Most Horrid: »Murder At Teatime«
20.00 Aristocrats
21.00 A Bit of Fry And Laurie
21.30 A History of Britain: »King Death«
22.30 Living with the Enemy: »Homphobes V Gays«
23.00 Maisie Raine: »An Ordinary Little Tragedy«

**BBC WORLD**

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 World News Tonight
2:00 BBC News
2:30 Talking Movies (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 HARDtalk (r)
9:00 BBC News
9:30 Talking Movies (r)
10:00 BBC News
10:30 Europe Direct (r)
11:00 BBC News
11:30 HARDtalk (r)
12:00 BBC News
12:30 World Business Report
12:45 Sport Today
13:00 BBC News
14:00 BBC News
14:30 Europe Direct (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:30 World Business Report
17:45 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Europe Direct (r)
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Click Online Special
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Panter-tanter(G)
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom(G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:20 Pæn pige - sej sild
13:45 Baywatch Hawaii(G)
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Med på moden
18:00 Sabrina - skolens heks
18:30 Alle tiders barnepige
19:00 Robinson - Talkshow
20:00 Øjne i natten
22:15 Tve-kampen(G)
23:15 Vore værste år
23:45 Simpsons
00:15 Ricki Lake(G)
01:10 Drøm videre
01:40 Vore værste år (G)
02:10 Simpsons(G)
02:40 Sunset Beach
03:25 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Heri Tróndheim á Argjum lesur
07.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Morgunrásin - Dia Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Politisk valsending. Tjóðveldisflokkurin (e)
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Heri Tróndheim á Argjum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
13.30 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Sigmar Bláberg leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Victor Carlsen stílar fyri
18.00 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Politisk valsending: Javnaðarflokkurin
19.30 Tilvera: Hvat er Islam - Armgarð Arge leggur til rættis
20.00 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

**Rás 2**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11:00 Politisk sending (e) - Endursending frá týsdegnum - Hesaferð við Sambandsflokkinum
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í KlaksvíkJohn William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Endatíðin: "Jesus kemur eftir samkomuni" - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ M.C. Restorff (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Horizon Star v/ Stella Zachariassen (e)
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnu kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379.
Vit gevast uml. middnátt

## Tilvera: Hvat er Islam

ÚF Hóskvøldið kl. 19.30

Samrøða við Óla Wolles, sum er ærari í religión.
Í fjølmiðlunum hava vit hoyrt nógv um Islam og muslimska heimin, men hvat er tað, sum Islam lærir?

Talebanar í Afghanistan hvat er tað? Orðið merkir studentur, og hesir studentar koma frá einum ávísum strongum skúla, sum arbeiðir fyri einum veruligum teokrati.

*Armgarð Arge leggur til rættis.*

## Sangir frá Fjallafonn (e)

SVF Hóskvøldið kl. 19.00

Nakrir av teimum bestu sangunum vit eiga á føroyskum eru skrivaðir av Hans Andreas Djurhuus. Barnarímur sum »Lítli beiggi« og »Kongaríkið í Bábylon« eru kendar av hvørjum mansbarni, eins og sjómansrímurnar eisini eru vorðnar fólkaogn. Í sendingini skulu vit hoyra nakrar av hesum vælkendu sangum framførdar av navnframum sangarum sum eitt nú Eivør Pálsdottir, Rúna Brattaberg, Úlvi við Høgadalsá, Hans Iversen og øðrum. Sangirnir vórðu framførdir til eina kvøldsetu í Sjónleikarhúsinum, har yrkingar og sjónleikur eftir Hans Andreas Djurhuus vóru á skránni. Tað var Hanus Kamban, sum legði kvøldsetuna til rættis í samband við sjónvarpssendingarnar »Lítli maður frá Fjallafonn«.

*Lagt til rættis: Hanus Kamban og SvF.*

## Øjne i natten

*- amerikanskur filmur frá 1987*

3 Hóskvøldið kl. 20.00

Politimenninir Chris og Bill skulu fylgja við Mariu. Fyrrverandi drongurin hjá Mariu er nemliga sloppin leysur úr fongslinum, og tað verður við vissu roknað við, at hann fer at koma forbí hjá Mariu. Tað, sum skuldi vera ein vanlig keðilig uppgáva, gerst skjótt meira spennandi, tá ið Chris gerst skotin í Mariu, og hon í honum. Fyriuttan at verða fangað av leiðsluni, og hetta krevur hjálp frá Bill, so má Chris eisini taka tann lívsfarliga dystin upp við fyrrverandi drongin hjá Mariu, ið als ikki er fegin um hennara nýggja kærleika.

## Simpsons

*– Amerikansk teknirøð*



3 Hóskvøldið kl. 23.45

# ítróttur

Nr. 217 • fríggjadagur • 9. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# 600.000 kr. í yvirskoti

**B36 hevði aftur í ár eitt sera gott ár fíggjarliga, og tá úrslitini á vøllinum eisini eru góð, tykjast øll verða nøgd um avrikið hjá nevndini**

AÐALFUNDUR
*Jákup Mørk*



*Kristian á Neystbø heldur fram sum formaður í B36*

Tað er ein sannroynd, at B36 við árunum hevur ment seg til eitt hitt sterkasta felagið í landinum.

Ikki minst peningaliga hevur felagið staðið seg væl, og aðalfundurin hin 4. november var eitt gott dømi um hetta.

Knappar 600.000 kr. stóðu á niðastu linjuni, tá ársroknskapurin varð almannakunngjørdur, og tá tað harumframt verður nevnt, at eingin skuld av týdningi ella aðrar skyldur hvíla á felagnum, er einki at siga til, at tað var ein væl nøgdur kassameistari, sum greiddi frá fíggjarligu gongdini í felagnum.

Tá formaður felagsins, Kristian á Neystabø, greiddi frá ítróttarliga partinum í júst lidna kappingarárinum, var lagið heldur ikki verri. Fyri fyrstu ferð hevur besta manslið felagsins í ár vunnið greipuna, og har afturat hava bæði kvinnu- og ungdómsdeildirnar góð úrslit at vísa á.

### Góðar vónir

Hvat viðvíkur fremsta liðnum, so hevði formaðurin eisini góðar vónir til komandi kappnigarár. Mest sum allur hópurin frá meistaraliðnum heldur fram komandi árið, men dentur varð tó samstundis lagdur á, at tað framvegis er hugsandi, at felagið fer at knýta aðrar leikarar uttan ífrá at felagnum, tó at eingi nøvn vórðu nevnd í hesum sambandi.

Havandi góðu úrslitini - bæði so og so - í huga, so var heldur einki at undrast á, at aðalfundurin við stórum meiriluta valdi verandi nevnd at halda fram. Tað vil so siga, at formaður felagsins framhaldandi er Kristian á Neystabø. Jón Johannesen er kassameistari, Kjartan Mohr er peningarøkil, meðan Hannis Egholm er skrivari. Har umframt er eisini Árni Rein í nevndini, meðan Malan Justinussen og Jan Nielsen eru tiltakslimir.

# Toppur og botnur hittast



*Kvinnuliðini hjá VÍF og Søljuni fara í kvøld at spæla í Vestmanna*

**Ósigraða kvinnuliðini hjá VÍF fær í kvøld vitjan av Søljuni, sum hevur vunnið ein dyst higartil til í ár**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Kvinnurnar hjá VÍF kunnu í kvøld økja um leiðsluna í 1. deild. VÍF fær vitjan av Søljuni, og vinnur VÍF dystin, eru tær fýra stig frammanfyri nummar tvey í deildini.

VÍF, sum vann bæði meistaraskapin og steypakappingina í fjør, hevur vunnið allar sínar fimm dystir í hesum kappingárinum, og tað er lítið sum bendir á, at tað verður Søljan, sum fer at taka fyrstu stigini frá vestmenningum.

Søljan hevur bara vunnið einaferð í ár, og hevur saman við StÍF og Kyndli tvey stig í botninum av deildini. Søljan hevur í onkrum dysti gjørt eitt sindur um seg, men tað skal nógv til, um sterka VÍF-liðið skal steðgast.

Dysturin millum VÍF og Søljuna verður í ítróttarhøllini í Vestmanna í kvøld kl. 18.00. Hannis og Uni Wardum taka sær av dømingini.

# Todi og fótbóltur á torginum

**Í samband við marknaðarføringina av nýggja fótbóltsspælinum, PILA, hevur SMS fingið Toda Jónsson og tveir av viðleikarum hansara at koma til Føroya**

FÓTBÓLTUR & SPÆL
*Jákup Mørk*

Talan verður tó ikki um, at skadda føroyska fótbólts-

nýggja føroyska fótbóltsspælinum, PILA, sum fæst til keyps frá leygardegnum at rokna.

### Stórt søluátak

Tað hevur leingi verið kunnugt, at eitt nýtt føroyskt fótbóltsspæl er á veg inn føroyska spælmarknaðin. Tað eru teir báðir Magnus og Súni Egholm, sum í felag havi uppfunnið hetta spælið, og nú er endiliga komið so-mikið væl áleiðis í hesum, at spælið er klárt at lata

prýtt við stórari myndaframsýning frá DM-heitinum hjá FCK. Hetta er ein framsýning, sum er gjørd í samstarvi við Sosialin, sum hevði umboð í Parkini tann 11. juni í ár, tá meistaraheitið varð staðfest.

Umframt myndaframsýningina, verða so eisini sjónbond við ymsum hendingum, sum viðvíkja FCK, ein sølubúð við FCK er opin, og so verður sjálvandi eitt eintak av PILA at síggja, eins og greitt verður frá reglunum til spælið.

nevnliga ikki gjørligt fyrr enn leygardagin, men tá fáa tey fótbóltsáhugaðu so eisini nakað eyka aftur fyri bíðitíðina.

Saman við Toda Jónsson verða nevnliga eisini Diego Tur og Pascal Simpson úr FCK, og teir fara so allir at skriva autografar til viðhaldsfólk síni. Autografarnir verða skrivaðir á antin PILA-spøl, sum sama dag verða til keyps fyri fyrstu ferð, ella á FCK-lutir, sum eru keyptir í FCK-handlinum, sum altso verður opin allar dagarnar.



*Todi Jónsson hevur fingið frí frá venjingini í Eysturríki, so hann kann verða við, tá nýggja fótbóltsspælið verður avdúkað í SMS leygardagin*